

# Basim á Summar Festivalin

**Ungi og sjarmerandi sangarin frá X Factor kappingini byrjar nýggja yrkisleið sum sangari við framførslu á Summar Festivalinum**

TÓNLEIKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

16 ára gamli Basim er eitt ordans sjarmutrøll. Í sjónvarpsrøðini X Factor tók hann pallin við stormi og brakaði ígjøgnum sjónvarpsskíggjan og út til danir og føroyingar, sum fylgdu við sangkappingini. Hann dugir framúr væl at framføra og við síni serstaku rødd er lítið at ivast í, at ein nýggj sangstjørna er fødd. Basim býr stutt uttanfyri Keypmannahavn, hann er júst liðugur við 9. flokk. Hann hevur arbeitt á McDonalds í frítíðini, men frameftir verður alt meira tíð nýtt til tónleikin. Fyrsta stakfløgan hjá Basim kemur út á Summar Festivalinum, og Basim fer sjálvsagt at framføra hendan sangin og aðrar á Summar Festivalinum.

Foreldrini hjá Basim er úr Marokko, og tað verður sagt, at sangevnini eru í familjuni. Pápin hevur sungið bæði í heimlandinum og Spania.

- Beiggi mín fekk meg at syngja, og hann hevur givið mær íblástur at brúka røddina hjá mær, sigur Basim.

- Sangurin er fyri meg ikki bara eitt ljóð, sum kemur út úr munninum á mær. Tað er meira ein háttur at úttrykkja mínar kenslur ella eina løtu, sum eg havi upplivað. Eg vil gjarna siga søgur fyri fólki, og vit skulu kunna grína og gráta saman, sigur Basim.

- Eg eri eisini byrjaður at skriva mínar egnu tekstir, og tað er stuttligt, sigur hann.

Basim og Summar Festivalurin ganga hond í hond. Tí í dag, nú hann verður kunngjørdur sum navn á Summar Festivalinum, fyllir hann 16 ár, og á sjálvum Summar Festivalum verður fyrsta stakfløgan hjá Basim givin út. Basim skal í kvøld tann 4. juli – á tjóðardegnum hjá USA – spæla til stórt hátíðarhald hjá amerikanska ambassadørinum í Danmark.

# Vinnuvitan 1,7 milliónir í halli

**Ársins átak hjá Vinnuhúsinum 2006 – »Vinnuvitan« - fekk tungan sjógv í 2007. Vinnuligi vitin fór í 2007 yvir í blóðreytt, fekk álvarsligar gjaldføristrupulleikar og er í 2008 seldur til gomlu Dimmu. Undirskotið hjá Vinnuvitan í 2007 var 1,7 milliónir krónur**



*Magni Olsen og Óli á Deild Olsen, menninir aftan fyri Vinnuvitan, tá teir í 2006 fingu heiðurin "Ársins átak" frá Vinnuhúsinum*

VINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Vinnuportalurin Business Line hevur eina greining av úrslitinum hjá blaðnum, sum hvørja viku greinar roknskapir hjá øðrum virkjum, Vinnuvitan. Ársúrslitið hjá Vinnuvitan fyri árið 2007 er alt annað enn gott.

- Uttan at kalla hugskotið genialt at fara undir útgávu av einum nýggjum vinnuligum tíðindablað í Føroyum, so skuldi tíðin tó vísa, at tørvur var á einum vinnuligum vikublað, ið hevði møguleika at gera meira burtur úr vinnuligum tilfari, enn verandi miðlar av góðum grundum fingu stundir til. Blaðið fekk rímiliga undirtøku og árini 2005 og 2006 góðu nøktandi úrslit, skrivar Business Line, sum vísir á, at tá tú hevur góðan vinnuligan byrð er kynsturin at halda fast um kjarnutænastuna og royna at hjúkla um hana.

» - Men Vinnuvitan-samtakið ynskti ikki at verða verandi lítlibeiggi í føroyska fjølmiðlaheiminum og valdi í 2007 at gera lánsfíggjaðar íløgur upp á slakar 10 milliónir krónur í lýsingarblaðið Vikublaðið við tilhoyrandi virksemi. Á henda hátt kom samtakið upp á somu støðd sum Dimmalætting og Miðlahúsið.

Gamaní hevur Vikublaðið verið ein góð forrætning fyri gomlu eigarnar, men nógv bendir á, at lánsfíggjaði keypsprísurin uppá slakar 10 milliónir krónur hevur verið í so stórur biti hjá Vinnuvitan. Fyritøkan rennir seg skjótt í gjaldføristrupulleikar, og endin er, at felagið, ið rekur Vinnuvitan verður selt til P/F Dimmalætting, ið nú roynir at binda um heilan fingur við at selja burtur av virkseminum.

Spurningurin er nú, um gamla Dimma fær broytt upp á matematikkina og fær minus + minus at geva pluss. Dimma hevði í 2005 og 2006 undirskot upp á tilsamans 2,5 mió kr, meðan Vinnuvitan sum áður nevnt hevði eitt undirskot í fjør upp á 1,7 milliónir krónur«, skrivar Business Line í greiningini av roknskapinum hjá P/F Vinnuvitan fyri 2007.

